## VIÐMERKINGAR

# Eru føroyingar ein tjóð ?

**Álvur Kirke**



Kristina Háfoss skrivar áhugaverda grein, "The show must go on!", í Dimmalætting leygardagin 19.juli.

Hon skrivar m.a.:

"Seinnu árini er komið alsamt oftari til sjóndar, at føroyingar í veruleikanum eru partur av einum leiki. Einum leiki, har danska stjórnin skrivar leikritið, sambandsfólk eru klappandi áskoðarar, og føroyingar annars luttaka í teimum leiklutum, ið verða teimum lutaðir."

Leikurin á Tvøroyri herfyri, tá danski forsætisráðharrin var á vitjan, kundi fyri tað verið kallaður "Nýggju klæði keisarans", - tí, hann var bluff, allur sum hann var.

KH heldur, at nú verður lættari at yvirtaka! Tað kann væl vera, men fáa vit meira veruligt sjálvstýri ? Tað er spurningurin ! Og har svarar hon sjálv við at siga, at nýggja yvirtøkulógin "fer ikki at broyta statsrættarligu støðu Føroya." og "Hon fer heldur ikki í sjálvum sær at geva okkum meira sjálvstýri enn heimastýrislógin."

Annars dámar mær væl, at KH brúkar orðið fullveldistøka, tí, vit fáa ikki fullveldi, fyrr enn vit taka fullveldi. Danir fara ikki at geva okkum fullveldi. Tað mugu vit sjálvir taka, tá vit hava ein politiskan meiriluta, sum hevur rygg til at taka ta avgerðina.

Eitt annað, sum KH nevnir, er spurningurin, um heimastýrislógin er ein fólkatingslóg ella ein avtala millum tvær tjóðir. Her er stóri trupulleikin, at danir als ikki vilja viðurkenna, at føroyingar eru ein tjóð!

Danir siga, at heimastýrislógin er ein fólkatingslóg, ið "útdelegerar" vald til føroyskar myndugleikar, og at danska fólkatingið, tá tað vil, kann taka aftur tað vald, ið verður "latið" føroyingum umvegis heimastýrislógina.

Hvussu danir gera tá á stendur, sóu vit í kreppuni, fyrst í 90-árunum.

Í samráðingum millum landsstýrið og donsku stjórnina, bar ikki til at koma longur, tí at Nyrup blankt noktaði at viðgera spurningin. Hann vildi ikki viðurkenna, at føroyingar eru ein tjóð, - og hann hevur eitt næstan samt fólkating aftanfyri seg í hesum máli !

Tað er møguligt, at fólkarætturin tryggjar okkum sjálvsavgerðarrættin í Føroyum, uttan mun til støðuna hjá donsku stjórnini, - alt annað hevði verið órímuligt. Men enn hava vit ikki havt ein politiskan meiriluta, sum torir at farið út um donsku girðingina, fyri at royna, um tað veruliga er so.

So leingi vit ikki hava ein politiskan meiriluta, sum torir at royna hetta í verki, uttanfyri donsku girðingina, mugu vit bert staðfesta, at leikurin, "The show", "Nýggju klæði keisarans", ella hvat vit nú skulu kalla hann, heldur fram.

Danska stjórnin skrivar leikritið, sambandsfólk eru klappandi áskoðarar, og føroyingar annars luttaka í teimum leiklutum, ið verða teimum lutaðir.

Eru føroyingar nøgdir við at sleppa at spæla sjálvstýri og at sleppa at luttaka í leikinum, sum danska stjórnin skrivar leikritið til, so er øll grund til at spyrja: Eru føroyingar ein tjóð?

# Búskapar- og samfelagsfrøðingar

**Hans Birgir Hansen**

Tað er slett ikki neyðugt at vera serfrøðingur við ymiskum heitum fyri at vísa á hvussu grundleggjandi skeivt og órættvíst alt er skipað kring landið, og her í Havnini. Bygnaðar- og hugburðabroytingar eiga at verða framdar úti í tí politiska lívinum og innanfyri politisku skipanini og lands- og kommunalpolitikk. Tað er við at fremja tillagingar til framleiðslu, útboð og eftirspurning av vørum og tænastum, og eisini inn- og útflutning, ið skal styrkja búskaparligu støðuna.

Tað er avgerandi neyðugt at fáa tillagað búskapin og samfelagið, handils- og vinnulív, og vinnurnar við ymiskum heiti, eftir framleiðslu, útboði og eftirspurningi. Tað er avgerandi neyðugt at fáa allar sethúsaeigarar úti á bygdum og býum, í øllum oyggjarsamfeløgum, at fremja slíkar broytingar og raðfestingar. Tað vil siga, so at bleytu virðini – sosiala samveran heima, á arbeiðsplássum, í frítíðarfeløgum og privatlívi annars – verða raðfest fremri enn tað materiella í dag. Tað hava øll ættarlið í Føroyum tørv á. At kenna seg góðkendan og virðismettan, og at fáa eina viðurkenning og eitt heraklapp frá sínum medmenniskjum hjálpir. Tað eiga at vera framdar broytingar av avtøku av øllum frádráttum og framíhjárættindum í skattaskipanini. Tað kundi verið skipað soleiðis fyri av »Fíggjarmálaráðnum« við fíggjarmálaráðharranum, Kartini Hansen, at fyrstu 5-6.000 kr. um mánaðin vóru skattafríar. Tað er tá øll hava goldið avdrag og rentur av brúkslánum, so sum el, telefon, tryggingar og neyðsynjarvørum, at há, miðal- og láginntøkur goldu 50% í skatti. Tá vildu vit sloppið undan lønarhækkingum, stættarmuni, framíhjárættindum, familju, vina og kenninga plitikkinum úti á øllum arbeiðsmarknaðum og arbeiðsplássum.

Tað, ein leggur upp til, er at fáa eitt rættvísari samfelagsbýti millum arbeiðandi fólki og arbeiðstøku úti á bygdum, býum í øllum oyggjarsamfeløgum í dag. Áðurnevnda umfatar eisini allar útbúgvingarskipanir, at fólkaskúlar, hægri skúlar, lærustovnar og læruplláss fáa lestrarstuðul og skattafría inntøku í dag.

# Vann kappsigling í sjálvgjørdum báti



TÍÐINDASKRIV
*Felagið Seglið*

Sunnudagin 13. juli var árliga kappsiglingin á Hvítanesi, har 20 bátar luttóku. Tað var áhugafelagið Seglið, íð skipaði fyri tiltakinum. Mjørki og lítil og ongin vindur gjørdu kappsiglingina minni væleydnaða enn tær undanfarnu.

Kappsiglingin var hildin á Kaldbaksfirði. Nógvi mjørkin ytst á fjørðinum viðførdi, at byrja var við bygdina í Kaldbak og siglt inn í Kaldbaksbotn. Eitt fitt lot var við byrjan, men miðskeiðis á teininum datt lotið burtur. Eftir at hava ligið í stilli eina góða løtu, var avgjørt at skjóta siglingina av.

Komnir útaftur á startmálið hildu menn vert var at royna enn einaferð, nú mjørkin var burtur og eitt lot lá inneftir fjørðinum. Avgjørt var at nýggjur startur skuldi verða ytst á Kaldbaksfirði og málið í Kaldbak. Sjálvt um tað bert var eitt fleyr komu allir bátar á mál.

Úrslitið var at Niels í Nesinum úr Tórshavn gjørdist væl fremst, Hoyvíksbáturin var annar og Gjáarbáturin triðjur. Nevnast skal at Alfred Gullbein sjálvur hevur smíðja bátin Niels í Nesinum og megnaði hann hesuferð at verða fremstur, eftir fleiri ferðir at verði tætt við.

Úrslitið viðførir at Niels í Nesinum nú er á einum deildum fyrstaplássið í kappingini fyri størri bátar, saman við Malla sum hesuferð gjørdist triðjur.

Annað plássið hjá Hoyvíksbátinum viðførir, at hann nú er fremstur fyri bólkin smærri bátar. Leivur sum frammanundan lá ájavnt Hoyvíksbátin, gjørdist hesuferð triðjur í bólkinum og er nú tvey stig frá fyrsta plássinum áðrenn seinasta umfar.

Í teirri samlaðu kappingini "Ársins sjógangari" gera somu bátar seg galdandi. Hoyvíksbáturin, sum undan hesum umfarinum lá á einum deildum fyrsta plássið saman við Leivi, liggur nú fremstur. Leivur er nú á einum deildum øðrum plássið saman við Niels í Nesinum, íð við sigrinum á Hvítanesi fór frá einum fimta plássið framm á eitt annað pláss. Sí annars úrslit og støður aðrastaðni á síðuni.

Seinasta og avgerandi kappsiglingin í summar verður Lions siglingin á Skálafjørðinum tann 18. - ella 24. august.

**ÚRSLIT-HVÍTANES**
**Úrslit - Hvítanes**
**Samlað kapping**

| | | |
|---|---|---|
| Nr. 1 Niels í Nesinum | Tórshavn | Alfred Gullbein |
| Nr. 2 Hoyvíksbáturin | Hoyvík | Egil Simonsen, Jóhan Simonsen |
| Nr. 3 Gjáarbáturin | Vestmanna | Janus Petersen |
| Nr. 4 Eyð | Runavík | Atli Leitisstein, Robert Langaard |
| Nr. 5 Malle | Kollafjørður | Oddmar Joensen, Marner Joensen |

**Smærri bátar**

| | |
|---|---|
| Nr. 1 Hoyvíksbáturin | Hoyvík |
| Nr. 2 Eyð | Runavík |
| Nr. 3 Leivur | Kollafjørður |
| Nr. 4 Vinur | Tórshavn |
| Nr. 5 Lítli | Kollafjørður |

**Størri bátar**

| | |
|---|---|
| Nr. 1 Niels í Nesinum | Tórshavn |
| Nr. 2 Gjáarbáturin | Vestmanna |
| Nr. 3 Malle | Kollafjørður |
| Nr. 4 Helga | Kaldbak |
| Nr. 5 Nón | Hósvík |

**SAMLAÐA STØÐAN ÁÐRENN SEINASTA UMFAR**
**Smærri bátar**

| | | |
|---|---|---|
| Nr. 1 Hoyvíksbáturin | Hoyvík | 14 |
| Nr. 2 Leivur | Kollafjørður | 12 |
| Nr. 3 Vinur | Tórshavn | 7 |
| Nr. 4 Eyð | Runavík | 4 |
| Nr. 5 Miðgerð | Kollafjørður | 3 |

**Størri bátar**

| | | |
|---|---|---|
| Nr. 1 Malle | Kollafjørður | 12 |
| Nr. 1 Niels í Nesinum | Tórshavn | 12 |
| Nr. 3 Svanur | Skála | 8 |
| Nr. 4 Gjáarbáturin | Vestmanna | 4 |
| Nr. 4 Helga | Kaldbak | 4 |

| "ÁRSINS SJÓGANGARI" | Stig |
|---|---|
| Nr. 1 Hoyvíksbáturin | - |
| Nr. 2 Leivur | - 4 |
| Nr. 2 Niels í Nesinum | - 4 |
| Nr. 4 Malle | - 5 |
| Nr. 5 Svanur | - 11 |
| Nr. 6 Vinur | |
| Nr. 7 Helga | |
| Nr. 8 Eyð | |
| Nr. 8 Guðrið | |





*Føroya Sparikassi hevur fyrstu seks mánaðirnar í ár klárað seg serstakliga illa, og úrslitið gjørdist 54 milliónir í undirskoti.*

# Risaundirskot í Sparikassanum

**Føroya Sparikassi hevði fyrstu seks mánaðirnar í ár eitt undirskot áljóðandi 54 millíónir krónur. Orsøkin er aftur hesaferð alivinnan**

ROKNSKAPUR
*Heri á Rógvi*

Alivinnan er í kreppu. Og kreppan hon merkist. Í síðstu viku almannakunngjørdi Føroya Banki eitt hálvársúrslit við halli áljóðandi 23 millónir.

Nú hevur Føroya Sparikassi eisini almanna-kunngjørt eitt hall fyri virksemið hjá bankanum fyri fyrstu seks mánaðirnar í ár.

Eins og hjá Føroya Banka er alivinnan orsøkin til hallið. Føroya Sparikassi hevur fyrsta hálvár bókað burturleggingar fyri í alt 138 milliónir, har meginparturin er farin til at leggja upp fyri tapi í sambandi við lánveitingar í alivinnuni.

Sosatt er ein vinningur upp á 23,5 mió. fyrstu seks mánaðirnar í fjør vorðin til eitt risastórt tap.

### Líkist

Við hálvársroknskapunum hjá Føroya Banka og Føroya Sparikassa ber til at gera sær eina mynd av støðuni í alivinnuni og samfelagnum. Hesir báðir størstu peningastovnarnir í Føroyum fíggja umleið helvt um helvt av alivinnuni, og kreppan merkist í báðum støðum.

Men burtursæð frá alivinnuni stendur betri til enn nakrantíð. Hálvársúrslitið hjá Føroya Sparikassa gav ein vinning av fíggjarpostum áljóðandi 137 milliónir, sum er 34 millíónir meira enn í fjør og metstórt. Trupulleikin er alivinnan.

Forstjórin í Føroya Sparikassa, Marner Jacobsen, sigur, at roknað verður við, at úrslitið fyri alt árið fer at javnviga.

Tann óvanliga svára kreppan í alivinnuni setur nú síni týðiligu spor í roknskapinum hjá Sparikassanum. Nógv tann størsti parturin av teimum 138 mió.kr. eru burturleggingar upp á alivinnuna, sum er sera illa fyri orsakað av fiskasjúkuni ILA og óvanliga lágum laksaprísum", sigur Marner Jacobsen, forstjóri í Føroya Sparikassa, sum tó fegnast um, at úrslitið av vanliga rakstrinum gjørdist metgott, verður sagt í tíðindaskrivi.

Samstundis verður viðmerkt, at at munandi minni av smolti verður sett út í ár í mun til í fjør. Virksemið í alivinnuni verður tí nógv skert í framtíðini.

### Tøl

Hóast eitt risastórt hall, so er fer Føroya Sparikassi ikki av knóranum í morgin. Eginogning er 827 milliónir, og solvensurin er góður, verður sagt. Sostatt tolir Føroya Sparikassi eitt tílíkt undirskot á hesum sinni.

Men vánaliga hálvársúrslitið merkir sjálvandi virðið á partabrøvunum og vinningsbýtið skeiva vegin. Útláni hjá Føroya Sparikassa var 30. juni 3,96 milliardir, og innlánið 3,83 milliardir.

Tað kostaði 62 milliónir at reka Føroya Sparikassi fyrstu seks mánaðirnar av 2003. Inntøkan av ómaksgjøldum vaks við tveimum milliónum til 9,9 milliónir, og skuldin hjá Føroya Sparikassa til lánistovnar vaks við 317 milliónum, men fíggjarstøðan er sum heild rættilig góð við yvir áttahundrað milliónum í eginpeningi.

Sosialurin
Lesið Sosialin
-tað loysir seg!

W W W . S O S I A L U R I N . F O